gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Alt vent á høvdið

## *Oddagrein*

TAÐ eru løgin signal, sum í hesum døgum verða meldað út úr Tinganesi. Meðan tað áður hevur verið banniorð millum tjóðveldisfólk bara somikið sum at taka Nato uppá tungu, er nú bráddliga vent í holuni og tykist nýggi formaður floksins at vera ein av heitastu talsmonnunum fyri Natolimaskapi. Tey mongu tjóðveldisfólk, sum hava verið við í mongu mótmælisgongunum móti Nato og milliterinum sum heild gretta ikki orð, nú løgmaður og varaløgmaður í sátt og semju eru farnir at bróta upp úr nýggjum. Harvið ganga teir eisini ímóti øllum teimum løgtingssamtyktum, sum teir og teirra hava verið við til at taka undir við mongu seinastu árini. Samtyktir, sum greitt søgdu, at Føroyar skulu standa uttan fyri alt herðnarligt vald.

NÚ verða so allar hesar samtyktir og øll tey fólk, ið stóðu aftanfyri tær, ofrað á fullveldisins altari. Øðrvísi kann tað ikki skiljast. Hvussu kann ein flokkur, hvørs røtur og høvuðsstuðlar hava havt sum hjartamál at ganga ímóti Natolimaskapi, nú bráddliga kúvenda! Og hvussu ber tað til, at allir teir tjóðveldismenn, sum í skrift og talu nettupp leikaðu harðast í móti eitt nú fólkaflokkinum í hesum máli, nú hava mist málið!

Í leirinum hjá løgmanni er støðan ikki øðrvísi. Har tykist eisini nógv vent á høvdið. Tí meðan løgmaður fyrr hevur tosað um eina breiða loysn í sjálvstýrismálinum, so hevur hann nú flaggað út sum kanska tann mest víðgongdi fullveldismaðurin av øllum. Hetta vita vit er ikki í samsvar við meiningina hjá einum stórum parti av fólkaflokkinum, sum ynskir at taka sjálvstýri stig fyri stig - nøkunlunda eftir sama leisti, sum Javnaðarflokkurin í dag gongur inn fyri.

VIT minnast øll, hvat ein av mest framstandandi fólkafloksmonnunum, Birgir Danielsen, segði herfyri: at hansara formaður og løgmaður lat seg manipulera av Høgna Hoydal. Einasta broyting, sum er hend síðani tá er tann, at Anfinn Kallsberg nú er farin at brúka orðið sjálvstýri ístaðin fyri fullveldi. At løgmaður er farin at geva Nato so stóran prioritet man tó neyvan hava nakað við sjálvstýrið at gera. Heldur er tað ein taktisk manøvra fyri at seta kíla í Tjóðveldisflokkin. Tað signalið hevur partamaðurin Bjarni Djurholm eisini fangað. Teir nýtast tó ikki at gera sær tann stóra ómakin, tí røturnar í Tjoðveldisflokkinum, antinatorøtturnar, lata seg blint leiða av formanni floksins, sum eftir øllum at døma hevur slept mong av gomlu tjóðveldisidealunum.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Mangt skal ein hoyra áðrenn oyruni detta av

*„Kommunan bjóðar fólki løn fyri at ansa egnum børnum!“ - Deja-vu?*

Tað eru eyðsæð eingin mørk fyri hvussu Tórshavnar Býráð kann snúgva sær, tá finnast skal ein loysn á ovurhonds stóra barnaansinartrupulleikanum. Nýggjasta krumspringið er, at familjur kunnu taka egin børn í dagrøkt, gjalda kommununi fyri dagrøktarplássið og samstundis fáa løn sum dagrøktarar. Einasta treytin er, at familjan tekur onnur børn í dagrøkt eisini.

**Ein neyðarslig loysn**
Við eini handavending er trupulleikin hjá familjuni loystur, frá at vera neyðardýr á langa bíðilistanum til barnaansing, til at fáa eitt dreymakall og verða sett í starv hjá kommununi - sum dagrøktarmamma! Versgóð!

Hetta er, umframt at vera eitt kamuflera kontantgjald, at gera sær dælt av vónleysu støðuni hjá fólki. Tí um fólk veruliga ynsktu at gerast dagrøktarar, so høvdu tey allarhelst longu verið tað.

Tað sum hendir nú, er, at fólk ikki síggja nakra aðra loysn og sostatt gerast dagrøktarar av neyð. Og hvør hevur gleði av einum fólki, hvørs einasta forfeingiliga ynski er at sleppa út aftur á arbeiðsmarknaðin, ja, sum kanska enntá hevur eina útbúgving? Børnini?

Nei, tað er eitt ógemeina undarligt hugflog hesi fólk hava. Toga, snara og toyggja veruleikanum - alt fyri at sleppa undan at taka støðu til og loysa áleikandi trupulleikan, nevniliga at eini 400 børn í kommununi ikki hava eitt ansingarpláss, men eru latin upp í hendurnar á tilvildarligum loysnum, líka frá vælviljandi næstringum til... ja, eg orki ikki tankan!

**Prógvar hugburðin**
Hettar prógvar enn einaferð hugburðin hjá avvarandi myndugleika til barnatilveruna. Eitt lítið bil, sum skal haldast eyga við og ansast. Og ikki eitt lítið skinn, sum hevur uppiborið eitt mennandi og avbjóðandi umhvørvi, har nærløgd og áhugað fólk starvast - ikki av neyð, men av hugi.

**Rigmor Dam**

# Fegnast um avgerðina hjá Tórbjørni Jacobsen

Vit heimahjálpir á Tvøroyri, fegnast stórliga um ta avgerð, sum Tórbjørn Jacobsen nú hevur tikið um at leggja almanna- og heilsumannaskúlan her.

Leingi hava vit bíðað eftir hesum skúlanum. Men vit hava bara hildið tað vera sjálvsagt, at skúlin, mestsum av sær sjálvum, varð lagdur í Havn, so nógvar av okkum hava longu gjørt húskjum okkara greitt, at í 1 - 1 1/2 ár fóru vit at búgva í Havn. Eingin av okkum hevði hildið tað verið truplult, tí vit er so von við at føroyska samfelagið er soleiðis skipað, at alt skal vera í Havn.

Tí tykist tað løgið, og eitt sindur hugstoytt, at bæði politikarar og fakfelagsleiðarar koma kropp av kroppi í fjølmiðlarnar, at gera greitt, at tað er ógjørligt hjá fólki norðanfjørðs at koma til Surðoyar í útbúgvingarørindum.

Og tað er ongin endi á grundgevingunum fyri, at skúlin ómøguligt má leggjast í Suðuroy. Men hesar grundgevingar eru so grunnar, at tær eru skjótar at vísa aftur.

Víst verður á, at tey, sum skulu ganga í hesum skúla eru ikki ungdómar, men tilkomnar konur við manni og børnum, og at tað verður ógjørligt at fáa tey til Suðuroyar at ganga í skúla.

Vit mugu spyrja: Hví skal tað vera ómøguligt hjá norðanfjørðskonum at flyta frá manni og børnum í 1- 1 1/2 ár, tá ið tað verður hildið at vera púra sjálvsagt, at vit, suðuroyarkonur, skulu gera tað?

Almanna - og heilsuskúlin skal vera ein deild av sjúkrasystraskúlanum. Ført verður fram, at tað ber ikki til at hava skúlastjóra í Havn og skúla á Tvøroyri.

Vit kunnu bara vísa á, at Miðnámsskúlin í Suðuroy er ein deild av studentaskúlanum í Havn, við einum skúlastjóra í Havn og einum deildarleiðara í Suðuroy. Soleiðis hevur tað verið síðani í sjeytiárunum og vit hava ikki hoyrt annað enn at tað virkar væl.

Vit eiga eisini at minnast til, hvussu stórur tekniski framburðurin hevur verið hesi seinastu árini. Men hvat er teknikurin verdur, um hann ikki verður brúktur. Og hvat er meiri sjálvsagt, enn at tann tekniski framburðurin í Føroyum verður brúktur til at styrkja útjaðaraøkini?

Vit minnast øll, tá ið alnetið kom til Føroyar og spurt varð, hvønn týdning hetta kundi fáa. Tá var tað onkur, sum júst kom inn á undirvísing og segði, at nú fór tað at bera til at sita í Sumba og lesa til prest í Keypmannahavn.

Tað er eisini nú um dagarnar, at vit hava sæð lýsing frá Handilsskúlanum, har teir bjóða næmingum til at taka útbúgving í Suðuroy við fjarundirvísing úr Havn. Næmingarnir í Suðuroy bæði síggja og hoyra lærara og næmingar í Havn í sjónvarpsskíggja, og lærari og næmingar í Havn síggja og hoyra líkaleiðis næmingarnir í Suðuroy á sjónvarpsskíggja.

Skal tað so ikki bera til at sita á Tvøroyri og lesa til almanna- og heilsuhjálpara úr Havn?

Tað er eisini nú í vikuni, at vit hava lisið í bløðunum um teir ovurhonds stóru bústaðartrupulleikarnar, hjá skúlanæmingum í Havn.

Hví leggja stein omaná byrðu og leggja enn størri trýst á bústaðarmarknaðin í Havn við einum skúla afturat?

Hinvegin kunnu vit vísa á, at tað er nógvar ferðir bíligari at leiga í Suðuroy enn í Havn, tí, her fært tú eini heil hús fyri tað, sum tú noyðist at gjalda fyri eitt verilsi í Havn.

Tað má eisini vera øllum greitt, at tað er nógva ferðir bíligari at leiga høli til skúlan í Suðuroy, enn tað er í høvuðsstaðnum. Bara á Tvøroyri standa fleiri hús tóm.

Sostatt eru bara fyrimunir av at flyta almanna- og heilsuskúlan til Suðuroyar. Men tað er tankavekjandi, at eitt so pikkalítið stig á økismenningarleið, sum hetta, skal fáa so dygga mótstøðu, sum ætlanin hjá Tórbirni Jacobsen at flyta almanna- og heilsuskúlan til Suðuroyar, hevur fingið.

Hetta avdúkar betri enn nakað annað, hvussu tungur andróðurin er hjá teimum, sum veruliga leggja ein týdning í politiska slagorðið »økismenning«. Og hetta er eitt fullgott dømi um, at skulu vit gera okkum vónir um nakra økismenning, krevst tað støðufastir politikarar, ið tora at taka avgerðir, sum ganga beint ímóti hugsanini hjá skrivstovuveldinum av øllum slagi. Íroknað fakfeløgini. Men ikki minst skal ein hugburðsbroyting til hjá teimum, sum ikki duga at síggja eina verð uttanfyri høvðusstaðin.

*Vinarliga vegna heimahjálpararnar á Tvøroyri*
**Ketty Petersen, Hildigarð Jacobsen og Hervør Svalbard**

## Ein heilsan frá Blákrossheiminum

Sagt verður frá, at mikukvøldsmøtini, sum hava verið á Blákrossheiminum, verða flutt oman í Blákrosscaféina.

Vit vilja takka tykkum øllum, sum yvir so nógv ár hava stuðlað okkum á Blákrossheiminum við at bera Guðs orð fram í sangi og vitnisburði. Eisini takka vit tykkum øllum, sum hava vitjað hesi kvøldini.

Vit vóna, at tit framhaldandi vilja stuðla tiltakinum.

Guð signi tykkum øll

**Sólborg Dulavík**



# Álitið um Skipaeftirlitið handað

**Greiða eigur at verða fingin á, um landsstýrið ynskir at yvirtaka málsøkini vitaverk, veðurtænastu og farvatnsuppmerking, ella um stjórnin krevur at tey verða yvirtikin saman við skipaeftirlitinum, sigur nevndin m.a. í tilmælinum**

Ólavur í Beiti

Í gjár fekk fiskimálaráðharrin álitið frá nevndini um yvirtøku av Skipaeftirlitinum.

Í nevndini sum hevur gjørt tilmælið hava m.a. sitið: Halgir Winther Poulsen, formaður, vegna Fiskimálastýrið Kristin Balle, vegna Sjóvinnufyrisitingina Eyðun Berth Jacobsen, vegna Reiðarafelagið fyri Farmaskip Óli Hammer, vegna Føroya Skipara og Navigatørfelag Ellintur M. Abrahamsen, vegna Søfartsstyrelsen, Arne Ulstrup, yvirskipasýnsmaður.

Arne Ulstrup hevur bert veitt nevndini tekniska hjálp og ráð um, hvussu føroysk lóggáva kann verða skipað og føroyskt skipaeftirlit verða sett á stovn, eftir at málsøkið skipaeftirlit er yvirtikið. Álitið er sostatt ikki neyðturviliga í samsvari við áskoðanina hjá ríkismyndugleikunum, sigur nevndin.

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðssetningurin hjá nevndini var ma., at gera lóg um skipatryggleikan, lóg um sigling og merking, og um føroyska sjólóg. Lýsa viðurskiftini millum Danmark og Føroyar og hvussu tey kunnu skipast, soleiðis at Føroyar fáa sjálvstøðuga umboðan í IMO og rættindi sum sjálvstøðugt limaland ella í eina tíð saman við Danmark. Eisini skuldi nevndin leggja dent á, at føroyska lóggávan og umsitingin verður so einkul sum møguligt, herundir at seta fram uppskot um regluverk og tvørgangandi samskipan í regluverkinum.

# Minka um breiðslu av sjúku

**Ein arbeiðsbólkur umboðandi Havbúnaðarfelagið og serkunnleika innan fiskasjúkur skal fylgja verkætlanini og tað er norska felagið VESO, sum hevur fingið uppgávuna at gera arbeiðið**

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður m.a. sagt, at Føroya Havbúnaðarfelag fer nú undir eina verkætlan, sum hevur til endamáls at minka um vandan fyri fiskasjúkum, og árinini av teimum á alivinnuna.

Í apríl í ár var fiskasjúkan ILA á fyrsta sinni staðfest í Føroyum. Henda sjúka hevur gjørt nógv um seg í grannalondunum, og tí fekk alivinnan í Føroyum ein hvøkk.

»Verkætlanin um sjúkufyribyrging« hevur ikki beinleiðis nakað við ILA-tilburðin í vár at gera - ætlanirnar um verkætlanina vóru klárar áðrenn ILA varð staðfest.

**Binda um heilan fingur**
Tilburðurin av hesari álvarsomu sjúku ger verkætlanina enn meira viðkomandi, og strikar undir at »best er at binda um heilan fingur.« Hetta sigur formaðurin í Havbúnaðarfelagnum, Hans Jacobsen.

Verkætlanin hevur til endamáls at kanna sjúkuviðurskiftini í Føroyum, so betrast kann um eftirlitið við fiskasjúkum. Við støði í kanningunum, ber til at nútímansgera og effektivisera smittu-fyribyrgjandi tiltøkini í alivinnuni.

Serligur dentur verður lagdur á at minka um breiðslu av sjúku millum klekistøðir, smoltstøðir og alistøðir á sjónum – og somuleiðis spjaðing av smittuevnum frá slátur- og framleiðsluvirkjum til aliøkir. Ætlanin er at koma við uppskotið um nakrar smittufyribyrgjandi meginreglur fyri bygna og rakstur av ymisku pørtunum í vinnuni. Hesar verða síðani lagdar fyri Landsdjóralæknan, ið er myndugleikin á økinum. Tað er so upp til myndugleikarnar í samráð við vinnuna at avgera, hvat av hesum verður sett í verk.

Ein arbeiðsbólkur við fólki umboðandi Havbúnaðarfelagið og serkunnleika innan fiskasjúkur skal fylgja verkætlanini og tað er norska felagið VESO (Vetrinærmedisinsk Oppdragssenter AS), sum hevur fingið uppgávuna, at gera arbeiðið. Havbúnaðarfelagið hevur fingið stuðul av játtani til havbúnaðarroyndir til umrøddu verkætlanina, skrivar Vinnuhúsið.

